## Spiltar frikadellur í handlum



Sjúkuelvandi bakteriur eru ávistar í kjøtfrikadellum, goymdar í kølidiski. Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur á heimasíðuni, at hon veit, at frikadellurnar eru seldar í handlum hjá Bónus og Mylnuni í Føroyum, men tær kunnu eisini havt verið at fingið í øðrum handlum. Frikadellurnar eru í 250 gram pakkum og tær eru pakkaðar 22. august 2007, á donskum virki við autorisatiónsnummari DK 884 EØF. Heilsufrøðiliga Starvsstovan biðjur fólk, sum hava keypt av hesum frikadellum, um at beina tær burtur, ella fara aftur til handilin við teimum.

# Einsamallur eftir á borgini

**Síðani avgerð varð tikin um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, hevur hvørt tað einasta starvsfólk sagt upp og stjórin er einsamallur eftir**

STRANDFERÐSLAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at tað hevur verið stórt mannfall á Strandferðsluni, síðani avgerð varð tikin um at flyta stovnin til Suðuroyar.

Tað var í februar í ár, at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, gjørdi av at flyta umsitingina hjá Strandferðsluni til Suðuroyar.

Tá varð mett, at fleiri av av starvsfólkunum fóru at siga seg úr starvi, tí tey vildu ikki flyta við stovninum.

Nú kann staðfestast, at hesin spádómur var rættur og tað í ólukkumáti.

Nú, tríggjar mánaðir fyri, at stovnurin skal flyta til Suðuroyar, kann staðfestast, at hvørt tað einasta starvsfólk hevur sagt upp.

Sostatt er bara sjálvur stjórin, Regin Vágadal eftir av teimum gomlu starvsfólkunum. Hann varð settur í stjórastarvið eftir at avgerð varð tikin um at flyta stovnin og fylgir sostatt við til Suðuroyar.

Annars hava øll hini 19 starvsfólkini sagt upp og tað verðu sostatt ein stovnur við spildurnýggjari manning, sum letur upp í Suðuroy á nýggjárinum.

Stúrt varð eisini fyri, at tað fór at knúsa stovnin at flyta hann til Suðuroyar, tí hetta var so spesialiserað arbeiðið, at fór alt fólki úr starvi, fóru nýggj fólk ikki at megna at reka Strandferðsluna víðari.

Men tað skilst á Regin Vágadal, at hann hevur góðar vónir í so máta.

Av tí, at alt fólkið er farið í annað starv, er samstundis rættiliga nógv nýtt fólk sett í starv.

Men tað hevur ikki verið at klaga um, heldur stjórin.

- Útskiftingin hevur bara gingið heilt væl. Vit eru ótrúliga væl nøgd við tey nýggju starvsfólkini, vit hava fingið, tí tað eru dugnalig fólk, so vit hava verið stak heppin við teirri nýggju manningini.

Í løtuni manglar Strandferðslan at seta fimm nýggj størv og tá er øll manningin í umsitingini á Strandferðsluni nýggj.

Men í løtuni er øll samferðsludeildin manntóm, so øll tey størvini mangla tey at seta.

Seinast hevur Strandferðslan nýliga sett Jan Haldansen settur sum leiðari á Sjódeildini og Hans Petur Joensen er settur sum leiðari á fíggjardeildini og hann flytir so úr Havnini til við til Suðuroyar.

Annars skal nýggjur leiðari setast á samferðsludeildina og tað starvið verður endurlýst í hesum døgum, tí ov fáir umsøkjarir vóru fyrru ferð, søkt varð, tá var bara ein umsókn og Strandferðslan vil hava fleiri umsóknir at velja ímillum.

- Annars hevur tað gingið heilt hampiligt at fáa fólk, sigur Regin Vágadal.



*Nú er Regin Vágadal einsamallur eftir á Strandferðsluni av teimum gomlu starvsfólkunum. Øll hini hava stungið í sekkin, síðani avgerð varð tikin um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar. Sostatt verður tað ein spildurnýggjur stovnur í flytir suður á Tvøroyri á nýggjárinum*

# Fekk onki lyfti um sandoyartunnilin

**Løgmaður fæst ikki at lova, at farið verður undir Sandoyartunnilin beint nú**

SANDOYARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er framvegis ógreitt um arbeiðið at gera Sandoyartunnilin, fer í gongd nú beinanvegin, ella um tunnilin skal bíða.

Í løgtinginum í gjár royndi Páll á Reynatúgvu at fáa løgmann at geva eini greið boð um, nær farið verður undir Sandoyartunnilin.

Men løgmaður fekst ikki at geva nakað lyfti í hesum sambandi.

Hann vísti á, at løgtingið hevur brúkt fitt av pengum upp á at gera forkanningar í sambandi við tunnilin.

- Tað er væl eitt tekin um,



*Jóannes Eidesgaard staðfestir, at ongin politisk semja er í samgonguni um Sandoyartunnilin, men hann hevur vónir um, at tað eydnast at finna eina semju, sum er nøktandi fyri bæði sandoyingar og suðuroyingar*

at vilji er til staðar at fara undir hann, segði løgmaður.

Jóannes Eidesgaard vísti eisini til samgonguskjalið, har tað stendur, at kanningar skulu gerast um fast samband um Skopunarfjørð við tí endamáli at betra um sambandið til Sandoyar og til Suðuroyar.

- Hesar forkanningar eru gjørdar og klárt er nú at fara undir projekteringina.

Hinvegin skal ein verklagslóg leggjast fyri løgtingið og ein slík er í løtuni til viðgerðar í teimum politisku flokkunum.

- Nær hon kemur aftur og nær hon kemur á tingborð, veldst um, hvussu drúgv tann politiska telvingin verður, segði Jóannes Eidesgaard.

Spurningurin er so, nær farið verður undir tunnilin.

- Tað veldst um, nær fíggingin er til taks, tvs, at tað verður Løgtingið, sum avgerð tann spurningin.

### Ongin semja gjørd

Gongur tað skjótt, kann tað vera rímiliga skjótt, men vit mugu ganga útfrá, at tað tekur kanska eitt ár at gera projekteringina lidna og eftir tað skal tunnilin bjóðast út so tað gongur væl meiri enn eitt ár til tað.

- Alt málið ber brá av, at tað er ikki endaliga viðgjørt, men tað er heilt týðiligt, hvat ætlanin er.

Sjálvur tekur hann heilt og fult undir við, at Sandoyartunnilin verður gjørdur og tí vildi hann sjálvur virka fyri, at farið verður undir tunnilin, ongantíð ov skjótt.

- Men vit skulu ígjøgnum eina politiska telving um hetta málið og vit skulu hava eina semju um, hvussu vit fara fram og tann semjan er ikki funnin enn, segði løgmaður.

Og hann legði afturat, at ábendingar eru um, at funnið verður fram til eina semju, sum er nøktandi fyri sandoyingar og suðuroyingar

### Ongin dagseting

Tinglimir mettu eisini, at Sandoyartunnilin er ikki bara lívsneyðugur fyri Sandoynna, men eisini fyri Suðuroy, sum so kann knýtast upp í meginøkið við sigling ímillum Suðuroy og Sandoy.

Men Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, vísti á, at samgongan hevur ongantíð dagfest, nær farast skal undir tunnilin.

Hann segði, at talan er um eina góða íløgu, men hon má sjálvandi tillagast, so at tað passar í íløgukarmin. Hansara mál er, at Sandoyartunnilin skal vera liðugur í 2014 - 2015.

Í hesum sambandi kann skoytast upp í, at tað tekur fýra ár at gera tunnilin.

Sostatt sær formaður Sambandfloksins fyri sær, at farið verður undir arbeiðið í 2010 ella 2011.

Suðuroyartingmenninir, Hergeir Nielsen og Johan Dahl mutaðu báðir ímóti at lata suðuroyarsiglingina fara um Sandoynna, tí teir vilja ikki missa Smyril, so leingi onki fast samband er við Suðuroyar.